TALGILDU FØROYAR

# Skjótari, léttari, tryggari og bíligari

Mínboks varð við løgtingslóg í 2023 javnsett við vanligan pappírspost. Og tá **Mínboks** er knýtt at **p-talinum** hjá móttakaranum og innihaldið bronglað, so hevur tú sum sendari vissu fyri, at **samskiftið er trygt** og kemur **rættstundis** til rætta persón.

Seinastu tíðina er Mínboks nógv ment fyri at bøta um tænastuna og gera samskiftið skynsamari. Tað skal vera einfaldari at senda brøv í Mínboks, og tí er ein vevtænasta ment, sum sendir postin umvegis Heldina.

**Kannið, hvør hevur Mínboks**: Tit vita, um móttakarin brúkar Mínboks ella annan hátt at samskifta.

**Samskifti við freistum:** Tit kunnu fáa váttað, at borgarin hevur lisið brævið.

**Skjótari og léttari:** Tit avgera sjálvi, um borgarar skulu kunna svara brøvum í Mínboks.

**Sendið post við egnari fakskipan:** Tað er lætt at sameina samskifti í Mínboks við tykkara fakskipanir sum t.d. Skjalhald, 360 ella Nema Journal. Við einum ískoytisforriti kunnu tit senda brøv beinleiðis úr tykkara skipan. Harumframt kunnu móttikin brøv verða journaliserað beinleiðis í rætta málið.

## Heldin er ein fortreyt

Tað er neyðugt at vera á Heldini fyri at kunna brúka nýggju vevtænastuna. Eru tit á Heldini frammanundan, kunnu flestu tykkara brúka verandi uppsetan til at knýta í vevtænastuna. Talan er um eitt skjótt og ómakaleyst skifti.

Soleiðis senda tit umvegis Heldina.

## Lóg um Mínboks

Í 2023 samtykti Løgtingið lóg um Mínboks. Lógin ásetur, at Mínboks er almenna talgilda postskipanin í Føroyum. Mínboks er javnsett við vanligan pappírspost, og rættarstøðan, um nær brøv eru komin fram, staðfest. Postur verður roknaður framkomin ta løtu, hann er atkomandi fyri móttakaran.

Talgild fulltrú gevur fleiri møguleikan at brúka Mínboks. Talgild atkoma hevur stóran týdning fyri nýtsluna av Mín boks. Eitt aðalmál hevur frá byrjan verið, at øll, sum vilja, skulu kunna luttaka í Talgildu Føroyum

Í nøkrum førum er neyðugt at biðja avvarðandi um at hjálpa sær við persónligum viðurskiftum.

### Spyr bara Taks

Mínboks gevur góða meining. Tá ið TAKS sendir árligu skattauppgerðina í Mínboks, eru fólk skjót at rita inn og lata brævið upp. **3. mars 2024** sendi TAKS brøv til útivið **35.000 fólk** í Mínboks. Longu **fyrsta samdøgrið** høvdu **22.500 fólk** lisið sítt bræv.

## Skjótari, léttari, tryggari og bíligari




## Nýggja tænastan er bíligari

Við nýggju vevtænastuni á Heldini koma nýggir prísir í gildi frá **1. januar 2025**. Yvirskipað er tað eitt nýtt, lágt mánaðargjald, og ein fastur prísur fyri hvørt brævið.

Tørvurin á at senda stór brøv er alsamt vaksandi, og nýggju prísirnir tryggja, at til ber at senda stórar mongdir av dátum uttan óvæntaðar útreiðslur.

**Øll, ið senda brøv í Mínboks, skulu í framtíðini rinda eitt mánaðargjald fyri at brúka tænastuna.**

Fyri tey, ið senda við gomlu loysnini, verður kostnaðurin fyri støddina av brævinum tann sami sum áður.

**Mínboks umvegis Heldina**

**1,95 kr.** *fyri brævið uttan mun til stødd*

**Mánaðargjald: 575 kr.**

**Senda við gomlu integratiónini**

**2 kr.** *fyri hvørja* **100 kb**

**Dømi:** Bræv á **250** kb kostar **6** kr.

**Mánaðargjald: 1.475 kr.**

## Skift til vevtænastuna á Mínboks

Vit mæla øllum, ið senda brøv í Mínboks, til at brúka vevtænastuna. Sí meira kunning um Mínboks og vegleiðingar á heimasíðu okkara á

talgildu.fo/minboks

Vit vóna, at tit taka væl í móti nýggju tænastuni. Hava tit spurningar, eru tit vælkomin at seta tykkum í samband við okkum.

Vinaliga heilsan

**Talgildu Føroyar**